**Jørgen Niclasen**
**landsstýrismaður**

Argir, 29. mai 2015

**Svar**

**upp á**

**fyrispurning nr. 97/2014 eftir § 52a í tingskipanini frá Páll á Reynatúgvu, løgtingsmanni, viðvíkjandi møguligari einskiljing av virkseminum hjá Landsverki**

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Er ætlanin at umskipa veghaldið og aðrar uppgávur hjá Landsverki í Føroyum?
2. Um so, eftir hvørjum leisti?
3. Er í umbúna at siga fólkunum, sum arbeiða hjá Landsverki á Sandoynni, úr starvi?
4. Er ætlanin at privatisera virksemið hjá Landsverki í Sandoynni?
5. Er ætlanin at útveita uppgávuna?
6. Er ætlanin at bjóða uppgávuna út?

**Svar**

<u>Til nr. 1</u>
Nógv politiskt kjak hevur verið um Landsverk seinnu árini. Tí var ein arbeiðsbólkur settur at kanna stovnin og tess virksemi. Arbeiðsbólkurin hevur sum kunnugt handað landsstýrismanninum eina frágreiðing um Landsverk, sum greinar stovnin, og hevur ymisk tilmæli um broytingar og annað. Henda frágreiðing fer nú til politiska viðgerð, og støða er ikki tikin til tilmælini.

Landsstýrismaðurin hevur tað grundsjónarmið, at uppgávur og verkætlanir hjá tí almenna eiga at verða bodnar út í frælsari kapping, har ið tað lønar seg. Kapping javnsetur og mennir vinnuna og skal tryggja, at kostnaðurin er so lágur sum gjørligt. Vit skulu fáa tað sama fyri minni.

<u>Til nr 2, 3, 4, 5, og 6</u>
Í løtuni eru ongar ítøkiligar ætlanir um útveiting ella privatisering av virksemi stovnsins í Sandoynni.

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður